# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**25. sunnudag e. trinitatis**
***Havnar kirkja:*** Kl. 14 biskupsvígsla – Hans Jacob Joensen, biskupur vígir Jógvan Fríðriksson
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Sverri Steinhólm, familjugudstænasta, Gentukórið úr Meinigheitshúsinum í Havn luttekur
***Argir:*** kl. 11, Hanus Simonsen, altargongd
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Heri J. Joensen
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Lestur
***Kl. 20:*** Suð konsert í Christianskirkjuni kl. 20.
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10 lestur, Pól Johannessen, trúboðari
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30 andakt, Karl Gudmund Henriksen, deknur
***Sands kirkja:*** kl. 12, Jákup Reinert Hansen
***Þorkeris kirkja:*** Sunnudagin gongur talvan fyri føroysku sjómanskirkjuna.

**Vesturkirkjan - konsert**
Leygardagin 24. nov. kl. 16, Konsert við kórinum »Suð«

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygarkvøldið kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgunmøti. Hilda og Erik Bedesvaag syngja og tala, kl. 11.30 Barnagudstænasta kl. 18 Evangeliskt møti. Fríðbjørg Jensen syngur og Øydis Olsen talar
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti. Eingin sunnudagsskúli, men tað verður FAMILJUMØTI kl. 17, drekkamunnur aftaná. Øll eru vælkomin.
suppa,sápa og frelsa síðan 1865

**Samkoman Lívdin Í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 verður familjumøti har evnið er »Hvat Jesus lærdi um børn«,
kl. 11.30 samfelagsløta
kl. 12 tilbiðjunarmøti har evnið er »Hvat Jesus lærdi um kvinnur«. Á báðum møtinum talar Tony Sargent.
www.livdin.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni og sunnukvøldið kl. 18 møti við Albin Hædd.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 bíbliugransking og barnabíbliutími. Kl. 11 gudstænasta, Jens V. Danielsen.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30 Samvera við drekka.
Kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Símin í Túni talar - evni: Ættfaðirin Jákup. Sunnudagsskúlin er hvønn sunnudag kl. 12. Øll børn eru hjartaliga vælkomin. Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Fríggjadagin kl. 7 bønarmøti.
Mánadagin kl. 17.15 venur barnakórið, kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin eingi tiltøk vegna legu í Nesvík.
www.oasan.fo

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Sylverius Jacobsen, evni: Trúgv og ivi.
Sunnudagin kl. 11 Sunnudagsskúli. Lusiagongd verður vant aftaná.
Sunnudagin kl. 18 Sangløta við Pétur Hans og Thomas Dam.
Mánadagin 26. nov. kl. 20 Sjómanskvinnuringurin møtist.
Øll hjartaliga vælkomin!
Sí annars www.koma.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 19 ungdómurin hevur jólahugna, kl. 19 MiniSalt hevur jólahugna hjá Maibritt & Sveinbjørn.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar, kl. 18 jólakonsert.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
http://www.gospel.fo

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti
Mánadag kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Leygardagin kl. 9.30 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v. Reimund Langgaard. Dramabólkur úr Leirvík luttekur. Sasho Bjartason syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 26. nov. í KFUK: Seinnapartssamkoman við Hilmari Jan Hansen.
Týsdagin 27. nov. kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing-kórið venur.
Hósdagin kl. 19 í KFUK: Basarur, sí lýsing aðrastaðni í blaðnum.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Leygarkvøldið kl. 20 Evang. møti við Tórmund Hansen. Herman og Gigga og onnur luttaka. Øll eru vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14 og møti við Martin Olsen, Rituvík, mennirnir syngja kl. 18.
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.
Bønarløta hóskvøldið kl. 19.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl.$ 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Preben Hansen talar.
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.

**Miðvágs Missiónshús**
Missiónsvikan heldur fram við møti fríggjakvøldið kl. 19:30. Ingolf Johannesen talar, Kirstin & Terje syngja. Barnaansing. Drekka aftaná.
Kl. 22 ungdómsløta.
Leygarkvøldið kl. 19.30 møti v/Hanus Simonsen, presti, Tofta streingjakór syngur. Barnaansing/innsavnan til húsið. Drekka aftaná.
Kl. 22 ungdómsløta.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og møti kl. 18 v/Torleif Johannesen, sangbólkurin »LJÓS« syngur. Barnaansing/innsavnan til heimamissiónina.
Hjartaliga vælkomin.

**Kedron, Sørvágur**
Leygardagur 24. nov. kl. 15: Hugnaløta fyri eldri.
Sunnudagur 25. nov. kl. 11: Morgunmøti. Kl. 11.30 Sunnudagsskúli í kjallaranum.
Kl. 18.00: Evangeliskt møti
Týsdagur 27. nov. Eingin bíbiltími fyri ung (8-10. fl.)
Mikudagur 28. nov. kl. 20: Bønarmøti.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Sunnudagin 25/11, evangeliskt vitnimøti kl. 18.
Verið vælkomin.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

**Berøa Saltangará**
Leygarkvøldið 24.11. kl. 20 - 23 »Løta fyri ung« frá 6. fl. og eldri.
Sunnudagin 25.11. kl. 11.30 Breyðbróting og sunnudagsskúli kl. 18.00 Evangeliskt møti .
Mikudagin 28.11. kl. 19.30 Húsbólkar.

**Missiónshúsið Thabor, Toftir**
***Eldrasamkoma*** verður fríggjadagin 23. november kl. 16. Simony og Amaliel Knudsen syngja og siga frá. Øll eru vælkomin!
Y.M.Barnaringurin bjóðar til Jólastovu í missiónshúsinum fríggjakvøldið 23. nov. kl 19 Børnini luttaka við sangi og leiki. Søla og burturluting til frama fyri Útimissión, sí annars Lýsingartorgið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Hugnaløta í missiónshúsinum***
Leygardagin 24. nov. kl. 20 verður hugnaløta í missiónshúsinum á Toftum, fyri sjófólkið, útróðrarmonnum, egnarum, landarum… og øðrum
Skrá:
Felagssangur, har »Regnaband« spælir
Andakt
Filmur frá Atlantic Navigator
Drekka
Spurnarkapping
Annað
Øll eru vælkomin!!!

**Tabor Toftir - Ungdómsmøti í Rituvík**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið í RITUVÍK kl. 20, har Ólavur Magnussen kemur at tosa um evni: Patriarkurin Jákup. Øll hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúlin er í kirkjutíð kl. 11 í kirkjukjallarinum.
Møti verður sunnukvøldið kl. 18, har Knút Larsen talar.

**Missiónshúsið í Oyndarfirði**
Møti sunnudagin kl. 17 v. John S. Myllhamar.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli
Kl. 19 møti við Alis og Martin Højsted
Kl. 21 ungdómsmøti við Niels Jacob Nielsen, sangur o.a verður eisini á skránni, Drekkamuður 1/2 tíma áðrenn ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Keldan, Skálafirði**
Vikuskiftismøtir við Hildu og Erik Bedsvaag úr Noreg.
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti við Erik Bedsvaag.
Leygardagin kl. 11 Kvinnumøti við Hildu Bedsvaag, kl. 14.30 Leiðaramøti við Erik Bedsvaag, kl. 21 Awake við Erik Bedsvaag.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Erik Bedsvaag.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur kl. 21 Ungdómsmøti - Evni: genta og drongur.
Sunnudagur kl. 17 Sunnudagsskúli og kl. 17 Sangmøti: Luttøka av Glyvrastreingjakóri, v/sangi og talu.
Eisini verður sangluttøka við Christian Joensen, o.fl.
Mikumorgun kl. 6 Bønarløta.
Mikudagur 28. nov. kl. 20 Bíbiltími – Ef.3,14-21 Grundfest í kærleika v/Jonhard Olsen.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 14.30 verður sunnudagsskúli,
kl. 18 verður møti við bíbliubólkinum hjá monnunum og kl. 21 verður ungdómsmøti við Sverra Kass.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**70 ár til dagin**
Mikudagin 28. november fyllir Jósvein Østerø, Klaksvík 70 ár. Dagurin verður hildin í KFUM & K í Klaksvík frá klokkan 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 27. novembur hava Sigrid og Emil Nolsøe Dali silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 1. desembur kl.19 í Eiriksgarði í Dali. Tey, ið vilja gleða okkum vid at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 361670 ella 224621 innan 19. novembur.

Týsdagin 4. desember hava hjúnini Birgit og Niclas Poulsen, Sumba, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í heiminum frá kl. 18 sama dag, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Sunnudagin 30. desember kunnu hjúnini Ann Arnadóttir og Hjørleif Dahl, Norðskála, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eydnuni á Oyrarbakka leygardagin 29. desember kl. 13-17. Tey, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 422353 ella 222403 innan 7. desember.

**Brúdleyp**
Leygardagin 1. desember giftast Olevina Egilstoft, Sandavágur og Rolf Herup Olsen, Tórshavn. Vígslan verður í Sandavágs kirkju kl. 14 og veitsla fyri innbodnum í Pálsstovu kl. 19.

Sunnudagin 2. des. kl. 13.00 giftast í Havnar kirkju Alma Heinesen, ættað úr Sørvági og Michael Vogn Pedersen, Silkeborg. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18.00.

**Hey hey**
Vit bæði giftast 28. desembur. vígslan verður í Betesda í Klaksvík kl. 13. vælkomst verður kl. 20 á Hotel Norð á Viðareiði. Tey ið hava hug at tekna seg til vælkomst, kunnu tekna seg á tlf. 589896 ella 264714. Síðsta freist at tekna seg er 1. desembur.



**Hans Jacob Østerø & Signa Drenkstein Johannesen**

Leygardagin 29. desember kl. 16 giftast í Sumbiar Kirkju, Beinta Lisberg, Sumba og Rógvi Joensen, Oyri. Veitslan verður í VB-Húsinum kl. 18. Tey sum vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. +45 27483492 (Beinta), +45 21783141 (Rógvi), 370529 (Sumba), 422208 (Oyri), innan leygardagin 8. desember.

## *Brúðarmyndir*



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt, vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 30.6.07 ógloymandi. Takk fyri gávur, fjarrit, blómur og góða hjálp.*
***Kærar heilsanir Maj-Britt og Johnny***